HALDIÐ SOSIALIN

400,- um ársfjórðingin
- sparið **450,-**
í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800
FAX 341801 · POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

Ókeypis
Verður sent øpostað Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær bláðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: _____
Bústaður: _____
Postnr.: _____
Bygd/bbýur: _____
Telefon nr.: _____
Undirskrift: _____

Lagnan hevur knýtt tey saman

Fyri fýra árum síðani møttust tey tilvildarliga. Nú eru tey gift, og spurningurin er so, nær nógvu børnini, sum Mary ynskir sær, fara at koma

Mary Elisabeth Donaldson úr Avstralia er nýggja krúnprinsessa Danmarkar. Hennara søga kundi verið tikin úr einum ævintýri um gentuna, sum fekk prinsin og kongaríkið

KONGALIGT BRÚDLEYP
Stefan í Skorini

Tað eru ikki meira enn fýra ár síðan, at krúnprinsurin møtti sínari prinsessu. Tað var við Olympisku leikirnar í Sydney í Avstralia á sumri 2000. Og tað var rættiliga tilvildarligt, at tey rendu seg í hvønn annan.

Mary Donaldson segði í samrøðu við Politiken, at tað kendist sum lagnan hevði fært tey bæði saman. Hon sigur, at um tey ikki høvdu møtt hvørjum øðrum við OL-leikirnar, høvdu tey við vissu funnið saman við eina kappsigling, sum var við oynna Tasmania nakrar mánaðir seinni, har Fríðrikur luttók.

Hon er fødd í Hobart í Tasmania tann 5. februar 1972 og er yngst av fýra systkjum. Móðir hennara doyði í 1997, og faðirin giftist uppaftur í 2001. Hon hevur útbúgving innanfyri løgfrøði og marknaðarføring frá universitetinum á Tasmania.

Nógv børn

Ein av uppgávunum hjá einari krúnprinsessu er sjálvsagt at føra kongaættina víðari. Við øðrum orðum at geva tí danska fólkinum nakrar prinsar og prinsessur. Og Mary Donaldson sigur seg vera tilreiðar at seta nógv børn í verðina saman við Fríðriki krúnprinsi.

Mary sigur í viðtali við Politiken, at hon fegin vil hava nógv børn. Hon leggur samstundis doyðin á, at hon skal uppala síni børn sjálv. Tað hevur mangan verið soleiðis í kongafamiljum, at uppalingin er latin uppí hendurnar á daddum og barnagentum, men hetta skal ikki vera soleiðis í tí donsku kongafamiljuni framyvir.

Mary Donaldson hevur higartil megnað at hildið eina frástøðu til tað danska fólkið, tí at hon hevur hildið fjølmiðlunum so langt burtur sum gjørligt. Tað eyðkenda við henni er, at hon hevur megnað at hildið privatlívið privat, tí at hon ongantíð hevur dámt at verið í ljóskastaranum hjá fjølmiðlunum. Men hetta má hon nú veitra farvæl til.

Stjørnan í Tasmania

Seinastu mánaðirnar hevur Mary Donaldson, sum nú má venja seg við at verða kallað Hennara hátign Mary (eftirnavnið er nevniliga strikað), verið tað heilt stóra samtaluevnið í Tasmania og um alt Avstralia.

Serliga kvinnurnar í heimstaði hennara gloypa hvørjum mola, sum fjølmiðlarnir kasta fyri tær. Tasmanbúgvar eru nevniliga sera fegnir og ernir um at eiga eina veruliga prinsessu, og hon hevur verið tað heilt heita evnið í fjølmiðlunum seinastu vikurnar. Tríggjar avstralskar sjónvarpsrásir hava nevniliga sent frá brúdleypinum.

Ferðast nógv

Eftir at móðir hennara doyði, fór Mary út at ferðast í tíggju mánaðir.

– Eg vildi sleppa burtur frá tí støðugu tilveruni í Avstralia og hevði tørv á at sveima eitt sindur uttan nakað ávíst mál. Aftaná setti eg búgv í Skotlandi, men tað var ov tíðliga. Eg saknaði mína familju ov nógv, og so fór eg heimaftur og fekk tíbetur eitt gott starv í Sydney, sigur Mary við Berlingske Tidende.

Og tað var her, at hon møtti krúnprinsinum. Restin er søga...

FAKTA

Mary Elisabeth Donaldson er fødd 5. februar í Hobart, høvuðsstaðnum í Tasmania. Hon er bachelor í handli og løgfrøði frá University of Tasmania.

Faðir hennara John Donaldson (f.1941) er skoti og professari í matematik. Móðirin Henrietta Donaldson (f.1942) doyði í 1997 eftir eina skurðviðgerð í hjartanum. Mary Donaldson hevur trý eldri systkin, Jane, Patricia og John.

Hennara yrkisleið hevur umfatað arbeiði í einum flogfelag, eini ráðgevingarstovu, einum lýsingarfyritøku og einum ognarvirki.

Vórðu Føroyar gloymdar?

Tað var ikki nógv, ið sást til Føroyar dagarnar kring kongaliga brúdleypið, tá alt tað danska ríkið stóð á øðrum enda. Eitt einsamalt føroyskt flagg í hondini á einum ógvuliga ídnum veittrandi manni á Nytorv kom upp á sjónvarpsupptøkurnar og fór heimin runt, men stórt meira var ikki. Eingin í Danmark hoyrdi um nakað um føroysku brúðargávuna, og krúnprinsaparið upplivdi einki føroyskt undirhald. Sosialurin spurdi Jóannes Eidesgaard, løgmann, um hann helt, at danir hava gloymt føroyingar

Rúnar Reistrup

Eftir brúdleypsvikuni at døma, heldur kongshúsið grønlendingar vera meira áhugaverdar enn føroyingar

Føroyar hava verið í so vælgoymdar í øllum brúdleypsresinum. Vóru tær gloymdar?

– Um tú samanber føroysku og grønlendsku umboðanina í brúdleypsfyrireikingunum, so má man staðfesta, at Grønland hevur verið munandi meira at sæð enn Føroyar. Men tað vísir seg oftani at vera so. Vit kundu væl verið betur umboðað, og serliga haldi eg at undir døgurðanum á Christiansborg hevði eitt føroyskt innslag í undirhaldinum verið uppá sítt pláss. Julie Bertelsen framførdi eitt grønlendskt lag, og tað riggaði sera væl. Vit kundu havt nakað líknandi.

Men hví vóru Føroyar so ósjónligar?

– Hetta er ikki fyrstu ferð at man upplivir, at danskarar eru meira hugaðir at dyrka eina grønlendska umboðan heldur enn eina føroyska umboðan. Tað hongur kanska saman við at vit eru meira líkir dønum enn grønlendingar eru, og á útlendska pallinum sær tað kanska frægari út fyri Danmark at hava grønlendska umboðan enn føroyska umboðan. Men eg má siga, at eg eri ikki rættiliga vísur í hví tað er so.

Hvat kundu føroyingar gjørt øðrvísi fyri at verið meira sjónligir?

– Nú trúgvi eg ikki, at grønlendingar sjálvir hava troka seg fram. Tað er eitt val hjá danska kongshúsinum hvør upptraðkar fyri brúðarparinum. Men um ein umbøn kom frá kongshúsinum um at útvega eitt nú føroyskt undirhald til døgurðan á Christiansborg, so hevði tað ikki skula staðið á.

Man hevur gjørt nakrar fínar føroyskar búnar til brúðarparið. Hví hevur einki verið at hoyrt til teir, tá nú grønlendska brúðargávan, sum eisini var tveir tjóðbúnar, varð umtalað í flestu donskum fjølmiðlum langt undan brúdleypinum?

– Gávan varð latin inn sambært føstum instruksum. Føroyski umboðsmaðurin læt gávuna inn og var seinni til audiens hjá brúðarparinum. Men altso, hatta er aftur eitt val hjá danska kongshúsinum. Tað kundi verið upp á sítt pláss, at donsk pressa gjørdi eitt sindur burturúr gávuni úr Føroyum, tí hatta er ikki nøkur vanlig gáva. Men mín greiða uppfatan er, at dønum dámar betur at dyrka tað grønlendska enn tað føroyska. Tað grønlendska er meira eksotiskt og riggar betur á altjóða pallinum.

Kann orsøkin ikki eisini vera, at føroyingar ikki hava dugað nóg væl at rópt varskó "her koma vit við eini gávu"?

– Vit eru ikki so framligir, og man kann uttan iva eisini taka eitt sindur í egnan barm.

Ætlanin hjá løgmanni og tingformanni var at siga krúnprinsaparinum, at tey vóru hjartaliga vælkomin til Føroya á vitjan. Parið hevur longu gjørt av at ferðast til Grønlands seinni í ár. Ein Føroyavitjan er ikki komin á skránna enn.

Tárini runnu um allan heim

Fjølmiðlar kring allan heim hava givið tí kongaliga brúdleypinum í Keypmannahavn nógvan ans. Tey famøsu tárini hjá krúnprinsinum hava stolið yvirskriftirnar, og Mary Donaldson hevur fingið eyknevnið "tann danska Lady Di"

KONGALIGT BRÚDLEYP
Stefan í Skorini

Aldarinnar brúdleyp. Hendingin, sum alt Danmark hevur bíðað eftir í tolni. Og tá tað endiliga fór av bakkastokki livdi tað upp til alt, ið fólk høvdu væntað og vónað.

Leygardagin var bíðirøðin uttanfyri Vor Frue Kirke fleiri hundrað metrar long, tí at fólk vildu inn at kenna rákan av royalum brúdleypi og romantikki. Blomstrini og brúdleypsprýðið stóð nevniliga órørt frá degnum fyri, tá øll eygu vóru vend móti vígsluni av krúnprinsinum og prinsessuni úr tí fjarskotna og eksotiska Avstralia.

Ímillum 200-250.000 fólk vóru við í hátíðarhaldinum á Amalienborg Slotsplads og í gøtunum í miðbýnum. Alt gekk avbera stilt og friðarligt fyri seg, sigur løgreglan, sum hevði 3300 løgreglumenn til arbeiðis hendan dagin.

Allur heimurin fylgdi við, tá Fríðrikur fekk sína prinsessu í aldarinnar brúdleypi

Framtíðin bjargað

Tað hava verið nógv, sum hava ivast í, um Fríðrikur krúnprinsur var tann rætti at taka við krúnuni eftir móðir sína. Til tíðir hevur yngri bróðirin Joachim verið mettur at hava betri kongatilfar í sær enn eldri bróðirin.

Men nú eftir brúdleypið siga danskir fjølmiðlar, at Fríðrikur er vaksin við uppgávuni og hevur funnið ta røttu kvinnuna at standa við sína lið, tá hann einaferð skal gerast kongur Danmarkar.

Tað danska kongshúsið er vorðið so vælumtókt millum danir, at framtíðin hjá tí tykist bjargað - fyribils í øllum førum. Fjølmiðlar halda, at Fríðrikur hevur megnað at byggja brýr millum tað aldargamla monarkiið og tað yngra ættarliðið, og hetta er vegurin fram hjá einum gamaldags stovni í 21. øld.

Á forsíðuni í Kina

Nógvir útlendskir fjølmiðlar fylgdu við tí kongaliga brúdleypinum, og tað fekk gott pláss í pressuni kring allan heim. Amerikanskir, evropeiskir og avstralskir fjølmiðlar vóru væl umboðaðir í Kongens København fríggjadagin og dagarnar frammanundan.

Men eisini í Kina var áhugi fyri einum brúdleypi í tí lítla Danmark. Blaðið China Daily hevði stóra mynd av parinum í kirkjuni á forsíðuni. So brúdleypið hevur um ikki annað skapt nógva umtalu úti í heimi.